# Systkinabørn sigraðu!

**Tær báðar, Nicolina Rubeksen og Rannvá Lútzen, gjørdust ávíkavíst nummar 1 og nummar 2 til triðja innleiðandi umfari av Ársins Songrødd 2002, sum varð hildið í Klaksvík fríggjakvøldið**

ÁRSINS SONGRØDD
*Ragnhild Ellingsgaard*


*Vinnarar: Systkinabørnini Nicolina Rubeksen og Rannvá Lútzen gjørdust ávíkavíst nummar 1 og nummar 2*

Klaksvík:
Eini 400 fólk vóru savnað í K.Í.- høllini fríggjakvøldið, tá triðja innleiðandi umfarið av Ársins Songrødd fór av bakkastokki.

7 luttakarar vóru, og í millum hesi var eisini einasta mannfólkið higar til í kappingini.

### Væl upplagdur James

Frásøgumaður hetta kvøldið var navnframi James Olsen, og eydnaðist tað honum at seta rættuligt lív í alt fólkið, sum var til staðar.

Frá fyrstu løtu fekk hann allar áhoyrararnar at vera við, og varð hann fagnaður við lógvabrestum og rópum, hvørja ferð hann vísti seg á pallinum.

Saman við tveimum dansigentum framførdi hann eisini sítt egna show, og dámdu áhoyrarunum framúr væl.

Í millum hvønn luttakara var plátuvendarin Martin Kjærbo á pallium og undirhelt áskoðararnar, og hetta var eisini við til at seta enn meir lív í fólkið.


*James Olsen: Ein væl upplagdur James Olsen á pallinum*

### Einasta mannfólk higartil

Sjálva kappingina byrjaði Jógvan á Høvdanum, yngri. Jógvan er væl kendur millum allar norðoyingar, og hevur hann eisini verið við í Ársins Songrødd fyrr.

Jógvan var einasta mannfólkið, sum luttók í kappingini hetta kvøldið, eins væl og hann er fyrsta mannfólki higartil í kappingini. Jógvan hevði sína egnu tulking av sanginum Follow Me hjá Uncle Kracker, men hetta var tó ikki nóg mikið til at fáa hann í finaluna.

### Høgt støði

Frá fyrireikarunum av kappingini frætta vit, at støðið millum tey luttakandi hesu ferð var sera høgt, og torført var hjá dómarunum at finna fram til røttu vinnararnar.

Hvør einstakur luttakari gjørdi nógv burtur úr teirra framførslu, og ikki minst høvdu tey hvør sum ein serstakliga góða rødd, sum tey dugdu væl at brúka.

Tó varð eftir allar framførslurnar greitt, at vinnarar av hesum umfarinum vórðu systkinabørnini Nicolina Rubeksen og Rannvá Lútzen.

### Liggur til familjuna

Hetta við at syngja hevur altíð ligið til familjuna. 14 ára gaml Rannvá hevur í nøkur ár verið ein av fremstu røddunum í Kulum Rótum, og 17 ára gamla Nicolina er heldur ikki heilt óvon við at syngja. Hon hevur longu verið við á ymsum konsertum, og eisini hevur hon roynt seg við Ársins Songrødd fyrr. Seinasta ár vann hon innleiðandi umfarið í Klaksvík, men tó eydnaðist henni ikki vinna finaluna í Havn.

So verður spennandi at vita, hvussu tær báðar fara at klára seg í finaluna, sum verður í Havn tann 29. juni.


*Luttakarar hetta kvøldið vóru Susan Guðjónsson, Sólgerð M. Joensen, Mathea Olsen, Rannvá Lútzen, Nicolina Rubeksen, Jógvan á Høvdanum og Randi Sivertsen*



# Fyrsti skúladagur

**Tey tjúgu, ið kláraðu upp um gáttina til fjarlestur útbúgvingina, høvdu fyrsta skúladag fríggjadagin**

FJARLESTUR
*Heri á Rógvi*

Tað var fyrsti skúladagur fríggjadagin. Fyrsti skúladagur hjá tjúgu fólkum. Tey tjúgu, sum hava fingið innivist á nýggju útbúgvingini innan leiðslu og fyrisiting, ið Robert Gordon University í Aberdeen bjóðar út í samstarvi við Føroya Handilsskúla. Tað var heldur ikki lítið, sum kanska ikki heilt ungu næmingar vóru spentir, tá lærararnir hjá teimum kundu geva teimum tilfar og greiða frá teimum næstu trimum árum, tá leiðsla og fyrisiting fara at mynda mangan kvøldartíman.

Sum vera mann til tílík høvi varð borðreitt við onkrum góðum. Næmingarnir fingu hvítvín, juice (sevja) og kokostoppar. Sum heild var alt tað, ið hoyrir einum fyrsta skúladagi til, til staðar á fyrsti skúladegnum fríggjadagin.

Tað vóru eisini nakrir fróðir næmingar, ið vóru møttir upp. Tey vistu sum var, at fleiri høvdu verið um boðið, og tey vóru tey útvaldur, av eimum skara, sum tald mong fleiri væl roynt og útbúgvin fólk. Fleiri enn hundrað royndu at sleppa inn, men tað vóru bert tey 20, ið megnaðu at klóra seg upp um gáttina.

Allir næmingarnir hava útbúgving frá lærdum háskúla við sær í viðførinum, soleiðis at talan er um nøkur væl kvalifiseraði fólk. Og tað krevur eisini eitt sindur at skula taka eina master- útbúgving. Ein master-útbúgving verður eftir teirri bretsku skipanini tikin eftir fýra ára útbúgving sum undergraduate. Ein master tekur vanliga eitt ár, soleiðis at fjarlesturin hjá teimum tjúgu føroyingunum er ein eitt ára long útbúgving, ið er longd til trý fyri betri at rigga sum partíðarlestur.


*Næmingarnir, ið næstu trý árini fara at taka eina master-útbúgving innan leiðslu og fyrisiting, avmyndaðir uttanfyri Handilsskúlan í Havn á teirra fyrsta skúladegi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Robert Gordon University:

# –Vit eru væl nøgd

**Leiðararnir fyri fjarlesturin hjá teimum tjúgu føroyingunum eru ógvuliga væl nøgdir við nýggju næmingar skúlans. –Støðið á næmingunum er sera høgt, og vit eru stórliga bilsnir yvir áhugan fyri lesnaðinum, sigur Alan Hunt frá Robert Gordon University**

FJARLESTUR
*Heri á Rógvi*

Úr Skotlandi vóru Alan Hunt og Martyn Orchard frá Robert Gordon University komnir til Føroya. Tað var í sambandi við, at teir á Robert Gordon byrjaðu upp á eina nýggja í samstarvi við Føroya Handilsskúla og oljufelagið BP, ið hevur fíggjað útbúgvingina.

Alan Hunt er tað teir rópa course leader fyri hetta slagið av útbúgving á Robert Gordon University, og hann fegnast um, at áhugin millum føroyingar er so mikið stórur. Samstundis er hann fegin um, at føroyingar hava tikið hetta stigið.

–Áhugin kom úr Føroyum upprunaliga. Frammanundan móttøka vit umsóknir frá fólki kring allan heim, og vit hava eisini kunnleika til Føroyar, soleiðis at tað ikki var torført hjá okkum at taka avgerðina um at byrja hetta nýggja samstarvið, sigur Alan Hunt.

Alan Hunt sigur hetta vera nakað nýtt fyri teir í so máta, at talan er um Føroyar. Kortini hava teir royndir við tílíkum arbeiði, og hetta er serstakt í so máta. Munurin sigur hann vera, at fjarstøðan millum skúlan og næmingarnar er stór, men teir eru glaðir fyri samstarvið við Føroya Handilsskúla, sum gevur teimum lesandi eitt tættari samband við skúlan, hóast talan er um fjarlestur.

Tá hetta var nakað heilt nýtt, so høvdu bæði Robert Gordon og Handilsskúlin ikki gjørt sær tær nógvu vónirnar um, at áhugin fór at vera nakað serliga stórur, hóast tey kendu, at áhugi og tørvur var eftir einari tílíkari útbúgving. Ùrslitið gjørdist, at 130 fólk søktu um upptøku, men pláss var sum sagt bert fyri teimum tjúgu.

–Vit eru sera væl nøgdir og satt at siga heilt ovfarnir av støðinum hjá teimum søkjandi. Akademiska støði er sera høgt, og hetta eru vit serstakliga fegnir um, tí hetta er ein útbúgving, ið krevur nógv frá teimum lesandi, og hon er á einum rættiliga høgum støði, sigur Alan Hunt.

Fríggjadagin fingu teir báðir frá Robert Gordon so fyrsta møguleikan at hitta næmingarnar, og teir lótu væl at.


*Teir báðir, Alan Hung og Martyn Orchard frá Robert Gordon lata væl at føroysku næmingunum. Teir eru avmyndaðir saman við Elsu Mariu Olsen frá Føroya Handilsskúla.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

–Hetta er ein sera nógv vitandi flokkur, ljóðaði tað frá Martyn Orchard.

Alan Hunt sigur, at teir hava lagt seg eftir tí akademiska støðinum fyrst og fremst, tá teir hava valgt næmingarnar út til útbúgvingina, og tað skortaði heldur ikki við kvalifiseraðum næmingum. Miðalaldurin er 38 ár, og teir meta talan vera um ein góðan blanding av fólki. Serliga fegnast teir um, at tað er ein góður blandingur millum fólk frá almenna og privata sektorinum.

### Kanna eftir

Enn er eingin avgerð tikin um, hvørt ein nýggjur flokkur av hesum slag skal upptakast.

–Tann stóri royndin verður at vita eftir, hvussu nógv klára tað, men vit fara eisini at gera eftirmetingar nakrir ferðir hesi næstu trý árini. Eydnast hetta væl, so kann tað væl hugsast, at eitt líknandi tilboð verður stáplað upp á beinini, men fyribils eru ongar ætlanir um at byrja ein nýggjan flokk, hóast áhugin hevur víst seg at vera so mikið stóran, sigur Alan Hunt.

### Prógvar eftirspurningin

Elsa Maria Olsen, deildarleiðari á Føroya Handilsskúla, sigur, at tað er ógvuliga harmiligt fyri Handilsskúlan at skula avvísa so nógvum fólkum.

–Hesi hava fyri tað nógva alt tað, ið krevst til eina tílíka útbúgving, og hetta prógvar, at tað er stórur eftirspurningur eftir hesum slagi av útbúgvingingum, sigur Elsa Maria Olsen.

Tá útbúgvingin av fyrstan tíð varð almannakunngjørd, so varð vísta Góðir tríggir triðingar av næmingunum koma úr høvuðsstaðarøkinum. Hetta heldur Elsa Maria skyldast, at tað flestu útbúgnu fólkini savnast í Havn, har mesta almenna umsiting er, og tað er eisini í høvuðsstaðarøkinum, at eftirspurningurin eftir væl útbúgnum fólki er størstur.

Handilsskúlin hevur ætlanir um, at innan fýra ár skal skúlin bjóða útbúgvingar innanfyri tað merkantila á bachelor støði. Hetta vónar Elsa Maria fer at eydnast, men hetta er sjálvandi nógv treytað av m.a. fígging og møguleikunum hjá skúlanum annars. Føroya Handilsskúli bjóðar í skrivandi stund útbúgvingar á hægri stigi sum kvøldskúla, og skúlin hevur harafturat eisini bjóða út datamatikara útbúgving, har teir seinastu næmingarnir júst vórður lidnir fyri góðum mánaði síðani.

HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi 5H
km. 75.000, árg. aug. 1999
162.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 52.500, árg. nov. 1999
172.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen ZX 1,4i 5H
km. 70.000, árg. feb. 1996
75.000,-

Mitsubishi Colt 1,3 GLXi 3H
km. 230.000, árg. jan. 1989
15.000,-

Mitsubishi L300 2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
80.000,-

Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5H
km. 145.000, árg. mai 1992
Sýnaður 08'00 52.000,-

Ford Escort 1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. juli 1996
70.000,-

Hyundai Accent 1,3 LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda E2200 Vøruvognur
km. 91.500, árg. mars 1997
Sýnaður 06'01 90.000,-

Peugeot 306 D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Toyota Corolla 2,0D
km. 99.000, árg. aug. 1998
117.000,-

VW Polo 1,9 SDi
km. 145.000, árg. sept.1997
90.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820